SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 5 | 5 - 0 - 0 | 138 | 104 | 34 | 10 |
| 2 VB | 5 | 4 - 0 - 1 | 156 | 105 | 51 | 8 |
| 3 Neistin | 5 | 4 - 0 - 1 | 154 | 105 | 49 | 8 |
| 4 Søljan | 5 | 3 - 0 - 2 | 150 | 116 | 34 | 6 |
| 5 VÍF | 5 | 2 - 0 - 3 | 124 | 135 | -11 | 4 |
| 6 StÍF | 5 | 1 - 1 - 3 | 119 | 134 | -15 | 3 |
| 7 Kyndil | 5 | 0 - 1 - 4 | 92 | 146 | -54 | 1 |
| 8 Tjaldur | 5 | 0 - 0 - 5 | 98 | 186 | -88 | 0 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 5 | 4 - 0 - 1 | 127 | 128 | -1 | 8 |
| 2 Kyndil | 4 | 3 - 0 - 1 | 120 | 92 | 28 | 6 |
| 3 H71 | 4 | 3 - 0 - 1 | 129 | 111 | 18 | 6 |
| 4 KÍF | 5 | 2 - 0 - 3 | 125 | 144 | -19 | 4 |
| 5 Neistin | 5 | 1 - 0 - 4 | 145 | 150 | -5 | 2 |
| 6 StÍF | 5 | 1 - 0 - 4 | 136 | 157 | -21 | 2 |

# Munurin staðfestur

**Bæði botnliðini vórðu snøgt sagt smurd av, tá dystir í bestu hondbóltsdeildini hjá kvinnum vóru á skránni fríggjakvøldið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tveir hondbóltsdystir í bestu kvinnudeildini vórðu leiktir fríggjadagin. Í báðum førum var talan um topp móti botni, og í báðum førum gjørdist talan eisini um stórsigrar.

Á Giljanesi tók Søljan ímóti Kyndli, og her var einki at rafla um. Søljan legði sjógv ímillum alt fyri eitt, og longu eftir fyrstu fáu minuttunum tóktist spurningurin bara vera, hvussu stórur sigurin skuldi verða.

Tað endaði við, at 25 mál vóru á muni, og so tykist Søljan vera komin aftur á beint, eftir at dystirnir móti bæði VB og Stjørnuni vórðu taptir.

## Skipanin?

Søljan er tó framvegis á fjórða plássinum, tí eisini VB hevði dyst sama kvøld. Hesin var í Runavík, har Tjaldur heldur til, og ein og hjá Søljuni, so vísti hetta seg at vera ein yvirkomulig uppgáva hjá kvinnunum úr Vági.

Heilt so stórur sum á Giljanesi var munurin tó ikki, men spenningurin var á leið tann sami. Nevnliga eingin.

Og dystirnir undirstrikaðu sum so eisini, at munurin millum tey ovastu fýra og tey niðaru fýra í bestu deildini er ræittiliga stórur. Stjørnan, Neistin, VB og Søljan tykjast longu nú at spæla í eini deild fyri seg sjálvan, og sum kappingin sær út nú, so er spurningurin, hvørt tað ikki vildi verið rætt, um broytingar vórðu gjørdar í skipanini, soleiðis sum ætlanin var. Tað vildi í øllum førum givið nakrar meira intensar dystir, enn teir sum vóru á skránni fríggjakvøldið.

### FAKTA

**Tjaldur-VB 17-39 (10-20)**
**Málskjúttar**
**Tjaldur:** Vesna Tomajek 6 (2), Heidi Heinesen 3, Kristine Ellingsgaard 2, Anni Højgaard 2, Julianna Rasmussen 2, Anna Hansen 1, Kirstin Jacobsen 1
**VB:** Daiva Tuomaite 11 (5), Aukse Vysniaskaite 8, Rannvá Augustinussen 7, Christina Holm 4, Laila Jespersen 4, Margreth Augustinussen 3, Arnleyð Hjelm 2
**Brotskøst:** Tjaldur 4, VB 6
**Útvísingar:** Tjaldur 3, VB 0
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Sámal Hansen

**Søljan-Kyndil 35-10 (16-5)**
**Málskjúttar**
**Søljan:** Nicoleta Radu Hansen 14, Lina Andriulyte 6, Heidi Maria Akselsen 5, Arnleyg Haraldsen 4 (4), Hertha J. Simonsen 4, Jana Jacobsen 2
**Kyndil:** Randi S. Wardum 4, Súsanna Petersen 3, Anja Midjord 1, Lotte Sørensen 1, Linda Weihe 1
**Brotskøst:** Søljan 4, Kyndil 1/
**Útvísingar:** Søljan 4, Kyndil 5
**Dómarar:** Uni Wardum & Hartvig Joensen

# Eingin dystur í Miðvági

**MB noktaði fyri at geva FSF dómaraseðilin fríggjadagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ein partur av úrskurðinum hjá FSF í samband við trætuna millum MB og SÍF var, at feløgini undan seinna dystinum skuldu lata dómaraseðlarnar til dystin inn í seinasta lagi fríggjadagin kl. 17.

Hetta varð tó ikki góðtikið av MB, og fríggjakvøldið kundi so staðfestast, at eingin seðil var komin.

Bjarki Mohr, formaður í kappingarnevndini sigur, at sambært úrskurðinum hjá nevndini, so merkir hetta í fyrsta lagi, at dysturin leygardagin varð tikin av skránni.

Hann vil tó ikki siga, hvat víðari hendir í málinum.

– Sum er einki avgjørt, um dysturin skal spælast seinni, ella um SÍF stendur sum vinnari. Tað er ein støða, sum kappingarnevndin má viðgera, og tann viðgerðin verður helst einaferð í komandi viku, sigur hann.

Set kross við Javnaðarflokkin í dag



Góðu veljarar

Sett kross við Javnaðarflokkin í dag og verð við til at sláa manngar um tað góða samfelagið.

Tað setur stór krøv til umsitingina og tað politisku viðgerðina í bygda- og býráðunum, at alt fleiri umsitingarlig økir verða løgd út á kommunurnar.

Skulu vit kenna okkum trygg við, at kommunan røkir áhugamálini hjá borgarunum á fullgóðan hátt, er neyðugt við sterkum javnaðarrøddum. Javnaðarrøddir, sum vilja samstarv og úrslit. Javnaðarrøddir, sum arbeiða fyri bøttum korum fyri okkum øll.

Við Javnaðarflokkinum í fremstu røð eru vit væl ávegis tí góða samfelagnum fyri okkum øll.

**Gott val.**

**Jóannes Eidesgaard, floksformaður**

x C

HALDIÐ SOSIALIN

450,- um ársfjórðingin
- sparið 395,- í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ______
Bústaður: ______
Postnr.: ______
Bygd/býur: ______
Telefon nr.: ______
Undirskrift: ______

Ókeypis
Verður sent óposta𝑑
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn



# Helt 100 ára føðingardagin á heimavølli







*Frá 100 ára haldinum í Vági um vikuskiftið*

*Myndir Trúboðin*

**Um vikuskiftið helt Heimamissiónin 100 ára føðingardagshald sítt suðuri í Vági, her arbeiðið byrjaði í 1904. Hildið varð fram mánadagin í høvuðssætinum norðuri í Nesvík, hagani virksemið í dag verður samskipað. Gestir úr øllum landinum hava verið við til hátíðarhaldini, teirra millum løgmaður Jóannes Ejdesgård, Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri og bispurin, Hans J. Joensen**

HÁTÍÐARHALD
*Snorri Brend*

Mánadagin 8. november vóru liðin 100 ár síðani Heimamissiónin sum rørsla sá dagsins ljós. Og hetta fór heldur ikki aftur við borðinum uttan markering.

Skipað varð tí fyri fleiri tiltøkum bæði fyri børnum, ungum og vaksnum í Vági, og aftur mánadagin - sjálvan stovningardagin - við tiltøkum fyri børnum, ungum og vaksnum í Leguhúsinum í Nesvík, sum samstundis er høvuðssætið hjá Heimamissiónini í Føroyum.

Til hesi bæði stóru tiltøkini hava Heimamissiónsfólk at savnast í stórum tali, eins og gestir aðrastaðni frá. Teirra millum er mentamálaráðharrin, sum bar fram heilsu við tiltakið mánadagin.

Í eini heilsan til Heimamissiónina, sum verður endurgivin í málgagni teirra "Trúboðin" tekur hann m.a. soleiðis til um týdningin hjá hesi rørsluni:

- Tað er trupult at seta orð á tann týdningin, sum arbeiðið hevur havt hesi seinastu 100 árini. Eg veit, at rørslan er stór og er næstan í hvørjari bygd í landinum.

- Uppgávan er fyrst og fremst at boða boðskapin um Kristus út, og síðani at fólk skulu halda seg til hansara. Persónliga hevur hetta havt stóran týdning fyri nógv fólk, men tað hevur eisini havt týdning fyri samfelagið og til dømis vinnulívið, sigur altso Jógvan á Lakjuni.

## Fyri allar aldursbólkar

At tiltakið júst varð lagt í Vági er ikki av tilvild. Tað var júst í Vági, at tann fyrsti trúboðarin hjá Indre Missión í Danmark, Axel Frederik Moe steig í land hin 8. november í 1904. Ein kann tí siga, at hátíðarhaldið verður hildið á heimligari grund.

Tiltakið í Vági, sum skal markera hesa stórhendingina, byrjaði fríggjakvøldið og helt áfram til sunnukvøldið. Leygardagin var barnatiltak í Vágs kirkju, har barnakórini í Sumba og Hvalba syngja, og har Petur F. Johannesen talaðu. Leygarkvøldið vvar ungdómsmøti fyri alla oynna.

Sunnudagin var gudstænasta í Vágs kirkju, sum prestarnir Patrick de Neergård og Bergur D. Joensen høvdu. Eftir gudstænastuna var døgurði í VB-húsinum.

Tiltøkini í Vági endaðu við møti sunnukvøldið, har fólk úr missiónshúsinum á Tvøroyri sungu, og Regin Høgnesen úr Leirvík talaði. Samanumtikið varð alt væleydnað, og fylktust fólk fjølment til tey mongu tiltøkini.

## Føðingardag í Nesvík

Í gjár var føðingardagstiltakið í Leguhúsinum í Nesvík. Tað byrjaði við barnatiltaki, har millum annað Ásbjørn og Absalon luttóku. Seinni vórðu heilsanir bornar fram, millum annað frá Hans J. Joensen, bispi og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismanni í mentamálum.

Klokkan 21 er ungdómscafe, har Jákup Justinussen og fleiri sungu.

Fleiri framsýningar við gomlum myndum og annað eru eisini bæði í Vági og í Nesvík.

## Bókaútgáva

Í sambandi við 100 ára tiltøkini, kemur eisini 2. bind í røðini um kirkju- og missiónssøguna út. Tað er Johs. Andr. Næs, ið hevur savnað saman og skrivað tilfarið.

Fyrsta bindið bar heitið "Varðar á kirkjugøtuni", meðan hetta ber heitið "Í Leirum og úr Leirum". Henda bókin viðgerð ta kirkjuligu støðuna næstseinasta aldarskifti og millum annað tveir av prestunum, ið vóru í Hvalba, Einar Michael Riise og Frantz Busch. Hesir vóru við at leggja lunnar undir og byrja Heimamissiónsarbeiðið í Føroyum fyri 100 árum síðani.

Bókin er 190 blaðsíður og kostar 200 krónur. Bókin verður at fáa bæði á tiltakinum í Vági og í Nesvík.